Sosialurin


# Jákup fer lætt um sannleikan

BJØRN KALSØ
løgtingsmaður



Seinastu dagarnar hevur Jákup Mikelsen malið kring spurningin, hvørt tað er rætt við færri aðalráðum ella ikki. Fyrst var hann ímóti, síðan fyri og seinast aftur ímóti. Fari kortini ikki at gera fleiri viðmerkingar til tann partin hesaferð. Tí mín støða er framvegis púra greið og óbroytt..

Fari heldur at gera eina lítla rættleiðing, tí at Jákup Mikkelsen velur at fara lætt um sannleikan, tá hann greinini "Er kaffi beiskt?" sigur: "*Tí hevur fólkaflokkurin mælt til at spara á almennu fyrisitingini, men sambandið segði nei og argumentið var, at hetta fór at krevja uppsagnir*".

**Tosa um sparingar, men fremja tær ikki**

Feskasta dømi um, at Fólkaflokkinum dámar betur at tosa um sparingar í almennu fyrisitingini, heldur enn at fremja tær í verki, er arbeiðið við Ólavsøkupakkanum og fíggjarlógini. Fólkaflokkurin ætlaði Uttanríkisráðnum eina játtan langt omanfyri onnur ráð. Hinir flokkarnir í samgongu fingu tó loksins skarvað stórar upphæddir av hesi ætlan, í fyrsta lagi áðrenn Ólavsøkupakkin varð lagdur fyri Løgtingið og í øðrum lagi, áðrenn fíggjarlógin var endaliga samtykt. Fólkaflokkurin vildi tó ikki fara longur, og tí slapst ikki heilt undan "risaráðnum" hjá Fólkaflokkinum hesaferð.

Somuleiðis vísir tað seg søguliga, at Fólkaflokkinum dámar betur at tosa um sparingar á almennu fyrisitingunum, heldur enn at fremja tær í verki. Fullveldisskeiðið, tá Fólkaflokkurin hevði leiðsluna, hækkaðu rakstrarútreiðslur landskassans við 1,2 mia. kr. Stórur partur av øktu útreiðslunum hetta tíðarskeiðið fór til almenna fyrisiting. Inntøkugrundarlagið varð samstundis munandi skert, uttan at neyðugar tillagingar vóru gjørdar. Upptakinum sita vit við í dag.

At tosa um sparingar uttan at fremja tær gevur onki. Skal hugsingur vera um at fáa stóra hallið hjá landskassanum burtur, verður neyðugt við bæði sparingum og tiltøkum, sum økja inntøkugrundarlagið.

Færri aðalráð og færri tingmenn hevði verið góð byrjan, men tað skal annað til eisini.

# Um mvg av skrásetingargjaldi

KÁRI P. HØJGAARD
floksformaður, Sjálvstýrisflokkurin



Sjálvstýrisflokkurin hevur áhaldandi roynt at fáa sligið fast nakrar meginreglur um rættartrygd í málinum um óheimilað meirvirðisgjald av skrásetingargjaldi av bilum.

Á landsfundinum í 2008 heittu limirnar á politisku myndugleikarnar um at taka málið upp. Tá ið hetta ikki varð gjørt, legði tingmanningin fram uppskot til løgtingslóg um viðferð teirra, ið hava goldið meirvirðisgjald av skrásetingargjaldi. Uppskotið var einfalt at víkja frá fyrning í málinum, men annars at lata dømandi valdið gera úrskurð, hvørt talan var um óheimilað kravt gjald.

Málið fekk tíverri ikki undirtøku, men nú hevur fíggjarmálaráðharrin í sjónvarpssending róð framundir, at fólk kortini eiga at verða javnsett, somu áskoðan hevur formaðurin í Fíggjarnevndini borið fram alment. Tað hendir, hóast mangir borgarar skrivliga hava fingið boð um, at krøvini verða mett fyrnaði eftir vanligari 5-ára freist.

Hesin mismunur og henda ógreiða hava vakt ans í samfelagnum og baklandi okkara. Landsnevnd Sjálvstýrisfloksins hevur heitt á tingmanningina um at leggja nevnda uppskot framaftur. Tingbólkurin er sinnaður at gera tað, men ruddiligast var, um landsstýrismaðurin og TAKS í felag meldaðu greitt út, herundir skrivliga til hvønn einstakan, ið hevur gjørt vart við seg við kæru ella á annan hátt, **at landið ikki fer at gera fyrning galdandi, í øllum førum ikki fyrrenn frá tí degi, tá ið fyrsti kærunevndarúrskurðurin varð sagdur.**

Tí verður hervið alment heitt á Føroya Landsstýri um at gera greitt, hvørja støðu landið hevur, so sleppast kann undan at viðgera hetta sum politiskt stríðsmál á tingi.

# Eclipse-stjórin rættleiðir

HAVGRÍMUR JOHANNESSEN
Handilsmaður, stjóri í Eclipse og pápi



Eg fari at koma við nøkrum rættingum til innslagið í Rás 2 á døgurða 22. januar

Eg hevði ikki hoyrt, hvat Bogi Andreasen og Salua Manai søgdu, áðrenn Rás 2 spurdi meg, og tí fekk eg ikki høvi at koma við rættingum til teirra rongu upplýsingar um til tiltakið í Eclipse í kvøld 22. januar.

Gestirnir, sum komu í Eclipse fríggjakvøld, fingu ongar skygdar hvítar t-shirts, so eg veit eg ikki, hvat tey bæði sipa til. Gestirnir komu í sínum egnu klæðum, og skuldi tað hent, at onkur varð komin í svimjiklæðum ella klæðum, ið tú sært ígjøgnum, sleppu tey ikki í inn. Hetta eru pástandir frá fólkum, sum ikki vilja, at føroyski ungdómurin skal drekka rúsdrekka og ganga í býnum.

Tað er ikki loyvt at taka myndatól inn í Eclipse, og um fólk høvdu slíkt inn við, varð tað tikið frá teimun. Í dag hava allar telefonir myndatól, og um onkur skuldi haft telefonina í lummanum, hevði hon neyvan riggar eftir tveir minuttir í vatni og skúmi.

Tað var ikki loyvt at taka rúsandi løg við sær inn í Eclipse, heldur ikki órúsandi løg.

Salua Manai spyr, hvør tað er, sum eg vildi hava skuldi koma at hyggja at hesum stakkals gentum. Fólk fari í býin fyri at hava tað stuttligt, dansa, tosa við fólk, fáa nýggir vinir og ikki minst fyri at blíva sædd, gentur, dreingir, konur og menn.

Vit gjalda uttan at blunka nógvar pengar fyri at sleppa til Danland, aquaparkir og annað í Danmark fyri at hava tað stuttligt. Tá er mann í svimjuklæðum og bikini. Og er hetta rætt? Nei eg bara spyrji. Fríggjakvøldið vótu brúktir til samans 500 litrar av vatni.

At fólk kunna fara í sauna á G! sum ungdómsportalurin Mess, í felag við festivalin skipaði fyri í 2009, har EINKI aldursmark var, kemur undir mentan og er okey. Tað, sum eg kanska gjørdi skeivt, var, at okkara skúmserfrøðingar vóru úr Danmark og ikki Finnlandi.

Hvat elvir forboð til? Upplýsing og at læra okkara ungdóm, hvussu ein ber seg at heima, í skúla, í samkomun og á dansustøðum er rætti og einasti máti, annaðhvørt rúsað ella ikki.

Eg vil at enda nýta høvið til at takka øll hesum mongu fólkunum, ið gjørdu seinasta vikuskitfið í Eclipse til tað besta ballið nakrantíð og helst eisini vátasta, bæði so og so.

Uttan hesa stóru umtalu, skúmballið fekk, á Rás 2, Sosialinum frá Boga og Saluu fríggjadagin, hevði neyvan verið útselt hjá Eclipse neyvan bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

Takk fyri!

# Verður felagið Javni brúkt politiskt?

ALFRED OLSEN
løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin



Fyrst av øllum vil eg takka felagnum Javna fyri tað megnar arbeiði, tit gera og eg ynski tykkum eydnu við arbeiði tykkara. Samstundis ynski eg formanninum eina hepna hond við teimum tiltøkum, sum tit hava sett tykkum fyri í 2010.

Sjálvur meti eg, at løgtingið hevur víst, at tað er fyri at gera broytingar í avvarðandi lógum, sum betra um viðurskiftini hjá fólki, sum koma undir veingjabreiðið hjá Javna.

Her vil eg vísa á, at broytingar í verjumálslógini vórðu einmælt samtyktar av Føroya Løgtingi, og tað vísir tann vælvilja, sum Løgtingið hevur, og harvið er so tann politiska lógarviðgerðin liðug.

**Kunningin**

Tann neyðuga formliga kunningin til øll, sum vara av t.d. verjumálslógini og lógini um yvirformyndarí, skuldi so verða gjørd av Ríkisumboðnum og sjálvandi av juristum í Innlendismálaráðnum.

Men nú lesa vit á portalum v.m., at Javni er farin undir eitt fundarátak í øllum landinum, og at løgtingsmaðurin hjá Sjálvstýrisflokkinum, Kári av Rógvi, er annar av fyrilestrarhaldarunum.

Hví brúkar Javni ikki tey fólkini hjá Ríkisumboðnum og Innlendismálaráðinum, sum hava arbeitt við og gjøgnumgingið tær broytingar, sum gjørdar eru í nevndu lógum, og sum tey kenna út og inn?

**Politisk misbrúk?**

Tað kann ikki vera rætt, og eg havi ilt við at góðtaka, at Javni letur seg misbrúka politiskt. Tí loyvi eg mær at mæla Javna til at brúka tey dugnaligu starvsfólkini hjá Innlendismálaráðnum og Ríkisumboðnum í teirra kunningarferð, - og ikki politakarar.

Tann politiska viðgerðin er liðug, og nú er tann neyðuga formliga kunningin eftir. Fari at ynskja Javna eina góða kunningarferð, leysa av øllum partapolitiskum royki.

# Hvør skal gjalda?

SOFUS DEBES JOHANNESEN



Ikki eiti á, sum nógv fólk og ávísir fjølmiðlar hava verið á gosi seinastu tíðina um mvg av skrásetingargjaldi av bilum í tíðarskeiðinum frá 1999 til 2005.

Flestu krevja, at øll, ið hava keypt bil hetta tíðarskeiðið, skulu hava afturgoldið part av keypsprísinum, sum svarar til mvg-ið av skrásetingargjaldinum, uttan at fyrilit skal takast fyri, at stórur partur av hesum krøvum er fallin fyri fyrningarfreistini, ið er 5 ár.

Eisini ávísir politikarar rópa upp um at gjalda út, so kanska skal eg vænta mær ein kekk upp á góðar 13.000 kr. fyri bilin, sum eg keypti í 2001, hóast eg ikki havi biðið um at fáa hendan pening.

Men hvussu er so við hesum peningi? Eigi eg hendan peningin? Og hvussu so við tí næsta eigaranum, sum keypti bilin, tá eg seinni seldi hann? Eigur hesin kanska part í hesum peningi?

Hetta eru spurningar, ið man als ikki hevur sæð stillaðar og enn minni svaraðar. Og tað haldi eg vera løgið, tá fjølmiðlarnir meta seg at vera so týdningarmiklar í samfelagsliga kjakinum.

Og so er eisini ein annar spurningur, ið ikki er viðgjørdur, hóast eg haldi hann avgjørt vera upp á sítt pláss í hesum kjakinum. Hvør skal gjalda peningin til landskassan og hvussu? Tí givið er, at við næstan einari milliard í halli, ber illa til hjá landskassanum at fíggja hesa afturgjalding uttan samstundis at fáa peningin aftur í kassan upp á onkran máta.

Tað hevur verið frammi, at talan er um minst 100 milliónir – 120 milliónir eru eisini nevndar.

Hetta svarar í meðal til einar 3.000 kr. fyri hvønn skattgjaldara.

Ella at vit øll gjalda eini 2% av allari inntøku okkara í eitt ár.

Ella skal hetta kanska áleggjast bilunum við hægri vegskatti? Havi roynt at leita á heimasíðuni hjá Hagstovuni, hvussu nógvir privatbilar eru í Føroyum, men kundi ikki finna tað. Um eg giti, at tað eru einir 15.000 privatbilar, so svarar hendan rokningin til 6.000 kr. fyri hvønn bil. So er bara at finna út av, um hesin eyka vegskatturin skal gjaldast upp á eitt ár, ella kanska yvir fleiri?

Eitt er vist: so ella so skal peningurin gjaldast aftur til landskassan!